# Íslendingar yvirmettu toskin

Íslendingar eru spakuliga við at koma yvir skelkin, eftir at fiskifrøðingarnir týsdagin í seinastu viku kunngjørdi síni døpru tilmæli fyri komandi ár. Nú fyrireikar landið seg til rakár. Øll umsitingin av íslendsku fiskastovnunum er í djúpari kreppu og stór ósemja er um hvussu stórir stovnarnir eru.

Øll vóru greið yvir, at fiskifrøðingarnir fóru at koma við eini frágreiðing um fiskastovnarnar, sum ikki var tespilig at lesa, men ongin vist, at so illa stóð til.Fiskifrøðingarnir løgdu fram eina frágreiðing, sum sigur, at íslendingar hava næstan avoytt tann týdningarmiklasta stovnin í fiskivinnuni, toskin, skrivar Intrafish

Fiskifrøðingarnir viðganga nú, at teir hava yvirmett toskastovnin millum 30-40 prosent seinastu trý árini. Málið hevur verið at fiska 25 prosent av stovninum. Men seinsta frágreiðingin vísir, at orsakað av skeivu metingini hjá fiskifrøðingunum, so hava íslendingar veitt millum 40-50 prosent av toskastovninum seinastu trý árini og tað tolir ongin stovnur í longdini.

Íslandstoskurin verður ikki veiddur á burðardyggan hátt. Kvotan er nú sett til 190.000 tons, meðan ICES hevur mælt til at fylgja 25 prosents regluni, fyri at tryggja eina burðartrygga gagnnýtslu av stovninum. Gjørdu íslendingar tað, so hevði kvotan fyri komandi ár verð verið 144.000 tons.

## Dýrt fiskamjølsbann

Um bannið hjá ES móti at nýta fiskamjøl sum djórafóður verður longt, fer hetta at merkja ein miss hjá fiskamjølsídnaðinum upp á 1645 milliónir norskar krónur árliga. Hetta sigur altjóða felagsskapurin hjá fiskamjølsframleiðarum IFOMA.

IFOMA heldur, at eini 350.000 tons av fiskamjøli fara til einkis hjá tí globala fiskamjølsídnaðinum, skrivar Intrafish.

– Fiskimálaráðharranir í Danmark, Fraklandi og Bretlandi tosaðu fyri at seta bannið úr gildi á fundinum í apríl.Hóast hetta, so var málið ikki við í endaskrivinum, tá fundurin var lokin og hetta eru vit vónbrotnir um, sigur stjórin í IFOMA, Stuart Barlow til Intrafish.

-Ministararáðið segði , at ES vildi leingja um bannið, men vildi ikki siga hvussu leingi,sigur Stuart.

## Roknar ikki við svartkjaftabanni

Norskir fiskamjølsframleiðarar trúgva ikki at bann verður sett fyri veiðu av svartkjafti og um so verður, so rokna teir ikki við, at prísurin á ráevni til fóðurframleiðslu verður so nógv dýrari, um svartkjafturin verður burtur eina tíð.

Eg rokni ikki við, at nakað svartkjaftabann verður sett í verk. Men hetta er ein greið ávaring frá fiskifrøðingunum um at nú má veiðan minkast, annars verður trýstið ov hart á stovnin. Tað hevur týdning at fáa eina altjóða stýring, men tað fer at taka tíð, áðrenn semja er um hesa. Allir eru samdir um, at nú má okkurt gerast, men ósemja er um hvussu, sigur Snorri Tilsæth frá Norsildmel við norsku vevsíðuna Intrafish.






# Hevur tú hugflogið...

## ...so hava vit møguleikarnar

Við tí leiðandi fíggjarliga leikluti, sum bankin hevur í tí føroyska samfelagnum, setur tað sera stór krøv til menning og marknaðarføring av bankanum.

Tí verður leitað eftir einum skapandi starvsfólki til Menningardeildina.

Starvið
Menningardeildin hevur m.a. dagligu ábyrgdina av marknaðarføring - bæði innanhýsis og uttanhýsis - herundir menning av deildum, produktum, tænastum og heimasíðu bankans.

Høvuðsuppgávan hjá tær verður at menna og marknaðarføra produktir og tænastur eins og at arbeiða við grafiskum skipanum.

Førleikakrøvini
Tað er ein fyritreyt, at tú:
- hevur útbúgving innan marknaðarføring
- ert opin fyri nýggjum avbjóðingum
- hevur góð samstarvsevni
- kanst starvast sjálvstøðugt

Tað er ein fyrimunur, um tú dugir grafiskar skipanir og dugir væl at málbera teg í skrift og talu.

Treytirnar
Setanartreytirnar verða avtalaðar eftir royndum og førleika.

Starvið skal setast skjótast gjørligt, men vit bíða gjarna eftir rætta starvsfólkinum.

Umsóknin
Hevur starvið tín áhuga, so send eina skrivliga umsókn saman við viðkomandi skjølum í seinasta lagi 18. juni 2001 til:

P/F Føroya Banki, Starvsfólkadeildin,
Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Jóan Stampe, menningarleiðara, á telefon 31 13 50.

FØROYA BANKI